

# Starvsfólk til Roknskapardeildina

Søkt verður eftir starvsfólki til Roknskapardeildina hjá Atlantic Airways. Starvið er eitt avloysarastarv, og er tíðaravmarkað til eitt ár.

**Arbeiðið fevnir um:**
Alt vanligt bókhaldsarbeiði.

**Krøv**
Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin:
- hevur kunnleika til bókhald
- hevur evni at samstarva og er ágrýtin
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góðan røkjuskap
- hevur kunnleika til at arbeiða við teldu

Vit bjóða eitt áhugavert starv við nógvum avbjóðingum, og møguleika fyri fakligari og persónligari menning í einum góðum og dynamiskum umhvørvi.

Avloysarin skal setast skjótast gjørligt, og setanartreytir verða avtalaðar nærri við setan.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 19. oktober 2006. Nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið hjá Tórhalli Halgaklett, roknskaparleiðara á tlf. 34 10 35 ella e-mail: torhallur@atlantic.fo.

**Umsóknin skal sendast til:**
Atlantic Airways, Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðari, Vága floghavn, 380 Sørvágur, ella til steinbjorn@atlantic.fo.

www.sansir.fo

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 180 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 378 milliónir krónur í 2005. Atlantic Airways hevur seks flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Hetlandi, Íslandi, Grønlandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrludeildin røkir ferðasamband til útoyggjarnar, leiti- og bjargingartænastu og off-shore flúgving í Norðurhøvum.

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum www.flyfaroe.com





Sosialurin
www.sosialurin.fo


Tíðaravmarkað starv og útbjóðing

# Avgreiðslu- og vaskifólk

Í sambandi við farloyvi verður við hesum søkt eftir avgreiðslufólki til farmastøðina á Drelnesi at seta í tíðaravmarkað starv sum skjótast og fram til 31. oktober 2007. Eisini verður reingerð av Farstøð á Krambatanga og Farmastøð á Drelnesi boðin út.

Freistin at søkja starvið sum avgreiðslufólk og at lata inn tilboð upp á reingerðingina er 23. oktober 2006.

Sí lýsingina á heimasíðu okkara www.ssl.fo

sansir.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS


HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

22 50 00
TÍÐINDAVAKTIN
ALT VIKUSKIFTIÐ



VIVA

Vikuskiftisvaktin hjá
SOSIALINUM
&
PORTALINUM
er at hitta alt vikuskiftið á
TELEFON 22 50 00
Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA